

*Útgerðin verður koyrd av keiini í lastbili hjá Valdemar Lützen*

reinsaði leiðina fram við fronsku strondina fyri minur, áðrenn teir sameindu framdu innrásina. Fyri hetta fekk hann eisini medalju.

Hersetingin skapti eisini nógv arbeiði við at gera barakkir og tílíkt fyri bretar. Tað kom eg eisini seinni at gera.

## Den røde djævel

Eg kendi væl teir donsku sokallaðu »grønu bátarnar«, sum vóru kallaðir Mac Kensie, Iceland, Yukun, Immanuel, Annie og L.A. Madsen, seinni kendur í Føroyum sum Árnanes, Iceland og England/Vestland.

Annie fekk eina ringa lagnu. Hon hvarv og varð seinni funnin á sandinum í Meðallandsbuktini. Báturin hevði ankrað og var rikin á land. Manningin sjólátst. Ein føroyingur var við, og tað var Eli Egholm.

Ein dagin kemur Hanneboyggi, Johan Johansen av Skála, til mín og sigur: »Tú Johan, tú hevur verið í snurrivod«. Tað var Vestland, sum manglaði ein mann. Teir vóru seks mans og vildu gjarna hava ein sjeynda mann við.

Í kjallaranum á sjómansheiminum var ein kjøtbúð, har ein tarvur hekk uttanfyri, og sum kallaðist Esbjerg. Hans Danielsen av Argjum hevði hana tá. Jens Reinert hevði havt hesa kjøtbúð, men hann var farin til Canada. Tá Jens kom aftur úr Canada seinni yvirtók hann handilin aftur.

Hesin danski báturin var á veg til Íslands, og hann hevði ísað kjøt við til Kjøtbúðina.

Hetta vóru so fínir bátar, reinir og snøggir, ikki minst samanborið við føroysku sluppirnar. Teir vóru grønir og vakurt málaðir. So fór eg at hyggja at bátinum, og mær dámdi hann væl. Eg sá, at hann var undir enskum flaggi og merktur til London.

Tá ið eg hevði verið við Hjalmar, hevði eg verið saman við danskarunum, so eg hevði nakrar royndir at tosa danskt, enntá jútskt.

Danirnir vóru fyri so vítt eisini interneraðir. Teir vóru farnir frá Danmark til Bretlands í apríl sum vanligt. Her plagdu teir at fiska til september ella oktober. Teir landaðu í Grimsby, og fóru so aftur til Danmarkar. Millum danskar fiskimenn vóru hesir roknaðir fyri at vera toppurin av fiskimonnum. Men sum støðan var blivin við hersetingini av Danmark, máttu teir skifta flagg og heimstað og sluppu so heldur ikki aftur til Danmarkar. Men nú skuldu teir so hava sína vanligu sesong. Tað sama var við nógvum øðrum donskum fiskibátum. Tað vóru eisini nógvir danskir fiskimenn, sum blivu verandi í Grimsby eftir kríggið.

## Enntá WC umborð

Eg fór avstað við Vestland tann 10. mai til Íslands. Tá ið eg kom umborð á Vestland kendist hetta sum at koma umborð á eitt flott skip. Har var wc, sum var púra ókent við sluppunum, tá bert ein spann ella kanska bert sjálv lúnningin varð brúkt til endamálið. Har var eisini heitt vatn at vaska sær við. Tað var líka ókent.

Tá ið vit sigldu norður gjøgnum Vestmannasund, spurdi eg eftir »den røde djævel«, hvørs rætta navn var Einar Thygesen. Hann var kallaður so, tí hann var so reyður í andlitinum. Eg hevði hoyrt um hann, og at hann var mettur at vera ein av teimum bestu fiskiskiparunum hjá dønum. Eg visti, at hann hevði fingið ein nýggjan bát, sum kallaðist England.

So spyrji eg ein av manningini: »Hvar er England?«. »Hetta er England,« sigur hann. Hann hevði skift navn og æt nú Vestland. »Hvar er so »den røde?«. »Tað er hann, sum stendur har í stýrihúsunum!«. Eg var líka við at leypa á sjógv av tí, sum eg hevði hoyrt um hann. Hann var kendur fyri at vera harður sum ber ólukkan.

Eg vil eisini siga, at hann var ein harður hálsur, men royndirnar seinni vístu, at hann var ikki brutalur við fólkið. Men hann kundi standa í minuttir og lesa


*Bretsku hermenninir leggja at bryggju. Teir hildu seg vera komnar til Noregs*

eiðirnar fyri sær. Hetta virkaði sera ógvusligt.

Eg føldi meg ikki væl at byrja við, men tá vit so komu til fiskarí, hevði eg tann fyrimun, at eg hevði verið til slíka veiðu frammanundan.

Johan var kokkur, men eg hjálpti honum. Okkurt var sum eg dugdi, og sum hann ikki var so góður til.

Tískil komu vit báðir at býta kokkaløn og dekkaraløn okkara millum. Tað, vit fingu, var 1% í part av brutto og tveir pensar av pundinum, sum vit seldu fyri. Tað gekk fínt. Eg kláraði meg væl millum teir og visti, hvat tað snúði seg um.

## Kakan spruttaði

Kokkurin spurdi meg ein dagin, hvussu hann kundi gera eina sandkaku. Jú, eg greiddi honum frá, at hann skuldi hava sukur, egg, margarin o.s.fr. Tað skuldi vera líka nógv í av øllum, so tað skuldi ikki verið so trupult. Tá vit so koma niður aftur at fáa drekka er kakan á borðinum. Tá skorið verður í hana, hevur hon hug til at sprutta. Tá hevði kokkurin gloymt at koyra mjøl í! Eg gekk út frá sum givið, at hann visti, at mjøl skuldi í eina kaku!

Seinastu vaktina á morgni plagdi eg at gera morgunmat við heitum rundstykkjum. Eg purraði út, og tá eg hevði gjørt hetta fór eg á dekkið. Eg var sjeyndi maður og hevði hetta arbeiðið fram í hjá.

Kokkurin fór í land eftir nøkrum túrum, og Hans Pauli Danielsen bleiv kokkur. Hann var sonur Dánjal á Hvítanesi. Hann var giftur við Petru, f. Mikkelsen úr Syðrugøtu. Hans Pauli var ein fínur kokkur.

Vit snurraðu og fiskaðu við Vestmannaoyggjarnar, í Meðalandsbuktini, við Ingolfshøvda, við Pappoynna, í Vopnafjørðin, rundan um Langanes og upp eftir Norðlandinum.

Vit fingu nógvan fisk og fyltu bátin hvørja ferð. Tað varð eisini drivið á, nærum sama hvussu veðrið var. Tað var heldur eingin tíð at spilla. Frá tí fiskaríið byrjaði, og til tað skuldi siglast til markna, mátti ikki ganga meira enn 10 dagar.

Tað var eisini skjótt, at vit fingu fult skip. »Røde« var ein rættiligur fiskimaður. Tá ið tíðin var farin fóru vit til Grimsby at landa.

## Stungu av frá bretskum herskipi

Vit sluppu undan vandamiklum hendingum. Ein hending var tó minnilig. Tað var kolasvart at sigla. Alt var myrkalagt, og skipini skuldu heldur ikki hava so frægt sum lanternurnar tendraðar. Vit koma tøffandi niður móti Flemburgh head. Hetta er beint áðrenn Humberánna, har teir stóru fiskivinnubýirnir Grimsby og Hull liggja.

Beint, sum vit sigla, verður ein ljóskastari settur á okkum. Hetta vísti seg at vera ein bretskur armeraður trolari. Hetta var ein av teimum trolarum, sum bretar høvdu tikið til krígstænastu, tí tørvur var á skipum í herflotanum.

Tað var so myrkt, so vit sóu júst silhuettina av trolaranum. Vit fingu so boð um at leggja stilt. Vit sóu nærum einki, uttan at menn stóðu við maskinbyrsu. Skiparin skilti so illa enskt. Hann fekk ikki rættuliga við, hvat hetta snúi seg um. Tað var eitt sindur av rulli, men hampiliga gott veður. Eina ferð letur i skiparanum: »Dette her gider jeg sgu ikke«. So fór hann inn í stýrhúsið og setti fulla ferð á. Tá hendi nakað! Vit høvdu ikki meira enn fingið ferð á bátin, tá kom trolarin uppá síðuna av okkum í fullari ferð. Vit sóu hann ikki, fyrr enn hann var beint uppá síðuna av okkum. Teir blakaðu fleiri dregg inn á dekkið, og hálaðu okkum inn at síðuni á teimum. Teir góvu boð at steðga skipinum, og tá sá »reyði«, at hetta var álvari. Tað komu átta mans inn á dekkið við bajonet og


*Á dekkinum á Vestland. Skiparin »den røde djævel« er uttast t.v.*